Landsstýriskvinnan skrivar í lesarabrævi at nýggja Elveitingarlógin byggir á semjuskjalið – sum skal tryggja framtíðar útbygging av elorkuøkinum í Føroyum - sum Magnus Rasmussen , Torbjørn Jacobsen , Heðin Mortensen og Kári Johansen, vegna Føroya fólk undirskrivaðu 22.Mars í 2022, og at avtalan er góðkend av bæði SEV og Kommunufelagnum.
Tað eru somu persónar í Kommunufelagnum sum í SEV, og valdsbýti og valdsharrarnir eru júst teir somu, og tí borgar ein tílík góðkenning als ikki fyri tryggleika fyri tær smáu kommunurnar sum síðan 1953 hava latið nógv náttúrutilfeingi til SEV. Semjuskjalið líkist einamest einari avtalu millum vinir sum eru bangnir fyri at missa valdið í SEV.

Tobbi og Magnus umboðaðu ikki bara alt føroya fólk tann 22.Mars í 2022, tí teir vóru eisini verandi og fyrrverandi borgarstjórar umboðandi Runavíkar kommunu (RK), og saman við Tórshavnar kommunu (TK), umboða báðar kommunurnar uml. 40% av atkvøðunum í SEV, og góð 50% av atkvøðunum í Kommunufelagnum. Semjuskjalið leggur beinleiðis upp til at meirilutin av atkvøðunum í SEV skal avgera bæði ferð og kós á grøna orkuskiftinum, og at orkuútbyggingar skulu ganga hond í hond við, og góðkennast av SEV.
Fyrstu avleiðingarnar av semjuskjalinum síggjast longu, nú Effo bjóðar SEV av á elorkuøkinum við eini stórari vindmyllulund í Runavíkar Kommunu, sum alment verður vælsignað av Hákun Djurhuus stjóra í SEV. https://kvf.fo/breddin?sid=165040 06:00 til 06:16

Tobbi hevur í fleiri ár gingið hond í hond við (TK) og SEV, har teir hava mótmælt almennu vindorkuútboðnum, og roynt at forkomið øllum nýggjum aktørum sum hava bjóðað seg fram til grøna orkuskiftið. Argumentini hava m.a. verið at myllurnar eru ov høgar , ov nógvar , ov tættar , SEV eru ikki klárir at taka ímóti orkuni , SEV hevur veitingarskyldu , brúkarin fær eina stóra eykarokning osv., men lukkutíð hava Sigurð í Jákupsstovu og Kári Mortensen hildið høvdið kalt, og kolldømt teirra spádómar, og tað er m.a tí at vit í dag hava tvær privatar vindmyllulundir í suðurstreymi sum spara samfelagnum uml. 30 mió litrar av tungolju um árið, og sum framleiða vindmyllustreymin 40% bíligari enn SEV klárar.

Effo & Vindrøkt eiga vindmyllulundina á Gellingarkletti sum framleiðir 100 mió. kwh um árið inn á netið hjá SEV, og ætlandi fer Effo at staðseta eina vindmyllulund í Runavíkar kommunu, sum kemur at framleiða 350 mió. kwh um árið. Við hesum verður samlaður máttur frá Effo 450 mió Kwh um árið.
450 mió. kwh um árið, er áleið tað sama sum alt tað føroyska samfelagið brúkti av el-orku í 2023, og tí skuldi ein trúð, at SEV og Tobbi, sum við treiskni hava vart monopolið hjá SEV, sóu hetta sum eina veruliga hóttan ímóti virkseminum hjá SEV, men her hoyrist ikki eitt orð frá Tobba, og í Breddanum https://kvf.fo/breddin?sid=165040 06:00 til 06:16 hálovar Hákun Djurhuus verkætlanina hjá Effo.
Í semjuskjalinum er tilskilað at orkuútbyggingar skulu ganga hond í hond við ætlanirnar hjá SEV. Verkætlanin hjá Effo hevur stóran týdning fyri (RK), og við vælsignilsi frá stjóranum í SEV, er fyrsta slagið hjá Tobba og Effo vunnið.
Her verður ikki tosað um alment útboð, ella ognartøku av lendið til vindmyllurnar, tí stórkapitalurin hevur longu gjørt avtalu við jarðeigarar https://kvf.fo/breddin?sid=165040 24:55 til 25:40 og samskift hevur eisini verið við (RK) um neyðug loyvir. Hettar er beinleiðis í andsøgn við ásetingarnar í semjuskjalinum. https://www.in.fo/news-detail/nu-vaentar-hann-at-tad-verdur-fridur 7:38 til 9:17 .

Við vindmyllulundini hjá Effo verða loyvir og avgerðir um semjur tiknar á býráðsfundum í Runavíkar kommunu.
Øðrvísi er tá SEV fer at útbyggja vatnorkuna í Norðurstreymoy. Tá heldur Tobbi at óneyðugt er at finna semju, og heldur ikki er neyðugt at fáa loyvi frá Vestmanna & Kvívíkar kommunu. Her krevur hann at landsmyndugleikin og Umhvørvisstovan geva harraboð til Vestmanna & Kvívíkar kommunu fyri at trýsta loyvini ígjøgnum, uttan mun til hvat lokaldemokratiið sigur.

Síðan 1953 hevur SEV heystað tríggjar milliardir Kwh úr vatnorkuni í Norðurstreymoy. Í 1963 fekk SEV loyvi at gagnnýta vatnorkuna komandi 50 árini, og í 2017 var loyvið endurnýggjað í 20 ár. Í Norðurstreymoy eru tikin, áir og vøtn, tilsamans 40 mió. fermetrar av náttúru, sum seinastu 70 árini, hava veitt el-megi, og skapt ómetaligan framburð fyri føroyska samfelagið, men ongin samsýning verður latin til kommunurnar í økjunum. (videoklipp av Kára Johansen https://kvf.fo/dv?sid=141304 . 19:54 til 24:00

Øðrvísi er tá Tórshavnar kommuna letur uml. 15.000 m2 av lendið til vindmyllulundina hjá LÍV & Magn í Flatnahaga, tí samsýningin til (TK) er 11,2 mió kr tilsamans yvir eitt tjúgu ára skeið. https://kvf.fo/greinar/2021/11/25/112-mio-kr-i-leigu-yvir-20-ar .

Tað er sjálvsøgd mannagongd at áðrenn byggiverkætlanir verða projekteraðar, verður samskift við avvarandi kommunu fyri at fáa staðfest hvørji sjónarmið kommunan hevur til verkætlanina. Júst sum Effo ger saman við (RK). SEV hevur arbeitt við Mýruverkið 2 í eini 15 ár, og brúkt uml. 60 mió kr, sjálvt um einki loyvi er fingið frá Vestmanna kommunu.
SEV vil ikki gjalda vestmanna kommunu fyri vatnið sum teir troyta í økinum, og tí vilja teir at landsmynduleikin gevur SEV heimild til at ognartaka og harvið taka treytaleysa suverenitetin frá kommununi.

SEV er ein felagsskapur sum 5000 fólk lata til, meðan 55.000 fólk fáa burtúrur, og tað er uppá tíðina at hesin ójavni verður rættaður. Hetta skapar stóra misnøgd millum kommunurnar. Tað er í dag eingin kommuna sum ynskir orkuútbyggingar í egnum øki, og einasta orsøkin til tað er at allur ágóði av elvirksemi fer beinleiðis í stórapott hjá SEV, har meirilutin í SEV, sum er tveir ella tríggir borgarstjórar, ráða fyri borgum. Tórshavnar kommuna hevur í 40 ár gjørt sær dælt av síni støðu sum nógv tann størsti eigarin í SEV, har teir hava flutt alt lønandi virksemi úr útjaðaranum til havnar, og nú onkur kommuna hevur eina aðra meining enn meirilutin í SEV, ætlar landstýriskvinnan, við lóg, at geva SEV heimild at taka treytaleysa suverenitetin frá kommununi, og tað marghátttliga er at formaðurin í kommunufelagnum gongur á odda í hesi herferð.

Tað er mín vón at Umhvørvismálaráðið í lógaruppskotinum fer at sláa rimmar fast at orkuútbyggingar skulu fremjast í samráð við avvarandi kommunur, júst sum Runavíkar kommuna ger við orkuútbyggingarnar hjá Effo og magn, bæði við olju vatni og vindi.

Heilsan
Jens Martin Lamhauge
Bjargalíð 9
350 Vestmanna
Tlf 221560